Vágs Kommuna

# Navna- og búmerkjakapping

Bygginevndin fyri ellis/røktarheimið, ið bygt verður í Vági, bjóðar hervið til navna- og búmerkjakapping.

Ynskiligt er, at fáa eitt stutt navn, sum fellur væl, og sum møguliga samljóðar við virksemi á staðnum.

Navna-og búmerkjauppskotini skulu, saman við stuttari frágreiðing, um hví tygum halda tygara navn vera hóskiligt, sendast til

*BYGGINEVNDIN*
*c/O Vágs kommuna*
*Vágsvegur 30*
*900 Vágur*

– og merkið brævbjálvan »Navna- og búmerkjakapping«

Navnið á luttakaranum skal ikki skrivast á uppskotini ella frágreiðingina, men leggjast í ein afturlatnan brævbjálva, saman við uppskotum og frágreiðing.

Nevndin tilskilar sær rætt til at velja millum innkomnu uppskotini, ella onki at velja.

Virðislønin fyri uppskotið er kr. 3.000

Somuleiðis tilskilar nevndin sær rætt til at velja navn og búmerki frá hvør sínum uppskotsstillara.

Virðislønin er tá kr. 2.000 fyri hvørt.

Uppskotini skulu vera bygginevndini í hendi áðrenn 1. juli 2010.

Bygginevndin fyri Ellis/røktarheimið.

**Vágs Kommuna**
**www.vagur.fo**


# SUPER ATV TILBOÐ

Allar maskinurnar eru útgjørdar við sleipukróki og eru sera væl dámdar innan landbrúk



**ATV Loncin**
275 ccm 4x4 **Bert 40.800,-**



**ATV Loncin**
257 ccm 4x4 **Bert 35.800,-**



**ATV Leopard**
250 ccm 4x2 **Bert 24.800,-**



**ATV Gepard**
150 ccm 4x2 **Bert 14.800,-**

Allir prísir eru við mvg

**SHJ-ATV-Import** Tlf. 57 00 00 · shj@altfyrieitt.fo



Lesið Sosialin -so eru tit við!


FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# Starv sum **havnaumsjónamaður** við Fuglafjarðar hav

Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leys til setan tann 01. juli 2010 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum skipsførari og førleika í enskum máli bæði í skrift og talu, somuleiðis sum tú skal duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga í føroyskum og haraftrat hava teldukunnleika á brúkarastøði.

Væntað verður eisini, at tú á jøvnum føti við starvsliðið á havnavaktini kann røkja loðstænastu av skipum, ið koma til og frá Fuglafjarðar havn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv, har tú eisini saman við leiðsluni fær møguleikar fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Skipara- & Navigatørfelag fyri havnaumsjónarmenn, somuleiðis sum skrivligur sáttmáli verður gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjararar við royndum innan sjóvinnu hava fyrimun.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar kommunu, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mikudagin 02. juni 2010 kl. 16.00.**

**Fleiri upplýsingar**
um starvið fáast við at venda sær til Rólant Højsted, havnameistara á telefon 737750, Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

***Fuglafjørður, tann 11. mai 2010***

# KVÍVÍKAR KOMMUNA

## søkir eftir námsfrøðingum til nýggja Dagstovnin í Kvívík

Til vøggustovu, barnagarð og frítíðarstovu verður søkt eftir námsfrøðingum. Um námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálparfólk sett.

Meira fæst at vita um størvini á heimasíðu okkara www.kvivik.fo

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4 · FO-340 Kvívík · www.kvivik.fo

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# Lærari í námsfrøði og almennum didaktikki

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

**Tíðaravmarkað[1] starv sum lærari í námsfrøði og almennum didaktikki er leyst at søkja á Fróðskaparsetri Føroya (Føroya Læraraskúla).**

**Starvsøki:**
Lærarin skal undirvísa lærara- og pedagoglesandi í námsfrøði og almennum didaktikki.

Starvið ber í sær undirvísing, vegleiðing og eftirmeting.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava kandidat- ella masterútbúgving í námsfrøði ella samsvarandi útbúgving. Tað er umráðandi, at viðkomandi sýnir hug og vilja til framhaldandi menning eisini sum granskari. Umsøkjarar, sum hava royndir við undirvísing og vegleiðing, og tey, sum hava granskingarroyndir, hava fyrimun.

**Umsókn:**
Umsóknarfreistin er 31. mai 2010.

Starvið verður sett 1. juli 2010 og gongur út 30. juni 2011. Starvið kann møguliga endurnýggjast eitt lestrarár í senn. Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV og arbeiðsroyndum skulu sendast Fróðskaparsetrinum. Við umsóknunum skal eisini fylgja eitt yvirlit yvir møguliga gransking og avrit av granskingaravrikum í trimum eintøkum.

Ein metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til rektaran á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo ella rektaran á Læraraskúlanum, Jóannes Hansen joannes@flsk.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fróðskaparsetur Føroya
J.C. Svabos gøtu 14, Postrúm 272,
FO-110 Tórshavn

1) Fróðskaparsetur Føroya er í løtuni í einari tilgongd, sum møguliga vil føra til broytingar í bygnaðinum. Starvið verður tí í fyrsta umfari sett sum eitt tíðaravmarkað starv.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**




SKÚLAFLOKKAR · ÍTRÓTTARFELØG · PENSJÓNISTAR · ARBEIÐSPLÁSS · BINDIKLUBBAR · GONGUFELØG

# Vælkomin til Íslands

Skipað verður fyri ferðum kring Ísland, m.a. til Gullfoss, Geysir, Tingvellir og Bláa Lón.



***TOSAÐ VERÐUR FØROYSKT***

**Bæði stórir og smáir bussar**
Tel. +354 861 3426 · davidsam@simnet.is
**Davíð Samúelsson,**
Góðkendur ferðaleiðari